# Dagrøktarskipanin í Tvøroyrar kommunu

## Viðtøkur fyri foreldraráðið

Við heimild í § 9 í løgtingslóg nr. 67 frá 10 mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 38 frá 9. mai 2006, og § 4 í reglugerð fyri virksemið í dagrøktarskipanini hjá Tvøroyrar kommunu, verða hesar viðtøkur settar í gildi fyri foreldraráðið í dagrøktini.

### Endamál

**§ 1.** Endamál foreldraráðsins er at fremja áhugamál foreldranna í samráði við leiðaran í dagrøktini. Foreldraráðið skal arbeiða fyri at bøta og styrkja um samstarvið millum foreldrini, dagrøktina og kommununa.

*Stk. 2.* Foreldraráðið skal vera ráðgevandi í mun til dagrøktarleiðaran, sum ikki er bundin av at fylgja ráðgevingini frá foreldraráðnum, um haldgóð grund er fyri hesum.

### Heiti

**§ 2.** Heitið er foreldraráðið fyri dagrøktarskipanina í Tvøroyrar kommunu.

### Valbæri til foreldraráðið

**§ 3.** Øll foreldur, sum hava børn i dagrøktini, kunnu veljast í foreldraráðið.

### Skipan av- og virksemi í foreldraráðnum

**§ 4.** Foreldraráðið er samansett við 5 limum. Tað er dagrøktarleiðarin, sum tekur stig til, at foreldraráðið verður valt á foreldrafundinum um heystið. Foreldraráðið verður valt fyri 2 ár ísenn. Fyri hvønn lim verður ein varalimur valdur. Gevst barn hjá ráðslimi í dagrøktini, tekur varalimurin sæti í foreldraráðnum.

*Stk. 2.* Foreldraráðið og tess varalimir verða valdir við vanligum atkvøðumeirluta millum tey foreldur, sum eru møtt á foreldrafundinum.

*Stk. 3.* Foreldraráðið skipar seg sjálvt við formanni/kvinnu, næstformanni/kvinnu og einum skrivara.

*Stk. 4.* Foreldraráðið hevur fund minst eina ferð hvønn ársfjórðing, og tað er formaðurin í ráðnum, sum kallar inn til fund. Berst formanninum frá at kallað inn til fund, er tað næstformaðurin, ið kallar inn til fund í foreldraráðnum.

*Stk. 5.* Fundur í foreldraráðnum er viðtøkuførur, tá í minsta lagi helmingurin av ráðslimunum eru møttir. Avgerðir í foreldraráðnum verða tiknar við vanligum atkvøðumeirluta. Miðjast skal tó ímóti, at avgerðir hjá foreldraráðnum eru einmæltar.

*Stk. 6.* Skrivarin letur úr hondum fundarfrásøgn, sum verður undirskrivað aftaná fundin av teimum limum í foreldraráðnum, sum hava luttikið á fundinum.
*Stk. 7.* Formaðurin/forkvinnan í foreldraráðnum kann boðað dagrøktarleiðaranum til fundar í ráðnum.

**Ábyrgdin hjá limum í foreldraráðnum**

**§ 5.** Limir í foreldraráðnum skulu arbeiða samvitskufult, og kemur ráðið fram á viðurskifti í dagrøktini, sum ikki eru ráðilig ella lóglig, skal ráðið beinanvegin kunnað dagrøktarleiðaran.

*Stk. 2.* Limir í foreldraráðnum hava tagnaðarskyldu um viðurskifti við atliti til dagrøktina, sum limirnir fáa kunnleika um. Tagnaðarskyldan er eisini galdandi aftaná at limur er farin úr foreldraráðnum.

**Innlit**

**§ 6.** Møguligar umbønir um innlit í frásagnir frá fundum í foreldraráðnum verða avgreiddar sambært ásetingum í fyrisitingarlógini, t.e. løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg.

**Dagføring og broyting**

**§ 7.** Tvøroyrar kommuna kann dagføra og broyta hesar viðtøkur, men skal í hvørjum einstøkum føri kunnað Tvøroyrar býráð hesum viðvíkjandi.

**Samtykt og góðkend**

**§ 8.** Tvøroyrar býráð hevur á fundi tann 13. november 2017 samtykt, at góðkenna hesar viðtøkur.

**Gildiskoma**

**§ 9.** Viðtøkurnar koma í gildi tann 1. januar 2018.

Tvøroyri, 13. november 2017

Kristin Michelsen
Borgarstjóri

Henrik Weihe Joensen
Kommunustjóri